Semja millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya
og
Maskinmeistarafelagið
um
maskinmeistarar hjá SEV

## 1. Sáttmálaøkið

Semjan fevnir um sáttmálan millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Maskinmeistarafelagið, um maskinmeistarar sum starvast hjá SEV.

## 2. Sáttmálaskeið

Sáttmálin verður at galda fyri tíðina 1. juli í 2008 til 1. oktober í 2010.

Partarnir eru samdir um 1. oktober 2008 at umrøða lønarspurningin, um munandi broytingar, ið hava ávirkan á lønarlagið, eru farnar fram í samfelagnum. Henda áseting kann ikki føra til, at sáttmálarnir verður uppsagdir í sáttmálaskeiðinum.

## 3. Løn

1. juli 2008 hækkar lønin 0,75 %
1. oktober í 2008 verður flutt yvir í nýggja lønartalvu
1. oktober í 2009 hækkar lønin 2,65 %

Partarnir eru samdir um, at maskinmeistarar hjá SEV flyta yvir í lønartalvuna og viðbótarskalan hjá Fíggjarmálaráðnum fyri alment settar maskinmeistarar á landi pr. 1. oktober 2008.

**Yvirflytingin verður gjørd soleiðis at maskinmeistarar í –**
2. lønarflokki flyta yvir í nýggjan skala í lønarflokk 4.
3. lønarflokki flyta yvir í nýggjan skala í lønarflokk 6.
4. lønarflokki flyta yvir í nýggjan skala í lønarflokk 9.
5. lønarflokki flyta yvir í nýggjan skala í lønarflokk 10.
6. lønarflokki flyta yvir í nýggjan skala í lønarflokk 12.
7. lønarflokki flyta yvir í nýggjan skala í lønarflokk 15.
9. lønarflokki flyta yvir í nýggjan skala í lønarflokk 16.
10. lønarflokki flyta yvir í nýggjan skala í lønarflokk 17.
11. lønarflokki flyta yvir í nýggjan skala í lønarflokk 18.

## 4. Eftirlønargjald

1. oktober í 2008 hækkar eftirlønargjaldið upp í 13,0 %
1. oktober í 2009 hækkar eftirlønargjaldið upp í 13,5 %

## 5. Broyttar orðingar í sáttmálunum

§ 2, stk. 3 verður broytt samsvarandi yvirflytingini í nýggja lønartalvu.

§ 4, stk. 1 fyrsta brot verður broytt soleiðis, at tað kemur at standa, frá 01.07.2008 rindar SEV sum arbeiðisgevarapart 8 % og eftirheldur og rindar sum løntakarapart 4 % av stigalønini sambært § 2

stk. 3 til eina av báðum pørtum góðkenda eftirlønarskipan. Frá 01.10.2008 fellur løntakarans partur burtur.
Frá 01.10.2008 rindar SEV 13 % til eina av báðum pørtum góðkenda eftirlønarskipan. Frá 01.10.2009 rindar SEV 13,5 % í eftirlønargjaldi.

§ 8 maskinmeistarar í lønarflokki 16 og uppeftir fáa ikki úrtíðarløn.

§ 21, stk. 2 í sáttmálanum verður broytt soleiðis, at tað kemur at standa:
"Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fastan Gerðarrætt."

6. Vaktargjald

| **1. juli 2008** | | **1. oktober 2008** | | **1. oktober 2009** | |
|---|---|---|---|---|---|
| Eykagjald I | 20,21 | Eykagjald I | 21,30 | Eykagjald I | 21,76 |
| Eykagjald II | 40,41 | Eykagjald II | 42,59 | Eykagjald II | 43,53 |
| Eykagjald III | 11,96 | Eykagjald III | 12,60 | Eykagjald III | 12,88 |

Sáttmálin og lønartalvur eru dagførdar samsvarandi omanfyristandandi.

*Í Tórshavn tann 25. juni í 2008*

**Maskinmeistarafelagið** **Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya**